# Keisara kvæði

(Hunda-tátturin)

Árla var um morgunin,
tá ið sólin rann:
”Hvør torir skjóta hundin,
sum eitur Pann?”

*Hann skjeyt hundin í trýnið.*

2. Til tað svaraði Keisarin,
har sum hann stóð:
”Eg man tora at renna
tað hundablóð.”

3. Sigga situr og bindur
eitt hosubrot:
”Latið nú hundin fella
fyri fyrsta skot!”

4. Til tað svaraði bóndin
tá í somu stund;
”Mætari krýatúr hevur hann felt
enn ein gamlan hund.”

5. Keisarin gongur eftir túninum,
hirsar buxur upp um knæ:
”Lána mær bóndans byrsu
av Selatrað!”

6. Keisarin gongur eftir túninum
við høgl og krút:
”Skjót nú, so at hundurin
hann [ei] brýtur út.”

7. Lúkan var til krútmáta,
og hon var full,
proppurin var av Breiðadali
av høvdaull.

8. Høgl og krút, tað fylgdist at
í byrsukjaft:
”Nú skal skjóta hundin,
lagdan upp í haft.”

9. Allir fylgdu hundinum
til rættarstað,
bundu hann har í línum fínum
ein mikudag.

10. Heiðrikur hann kennir
henda ringa lutt:
”Hoyr tú, Keisarin, søti mín,
ger málið stutt!”

11. Hundurin stendur á hamrinum,
hugsar so við sær:
”Hetta man vera Keisarin,
ið siktar eftir mær!”

12. Ógvuligt var dundrið,
tá ið skotið gekk:
Eittans haglið hundurin
í trýnið fekk.

13. Hundurin skar so sára við,
tá hann haglið fekk:
Allir teir, á hamrinum vóru,
meintu, staðurin forgekk.

14. Til tað svaraði Geiparin,
tá ið blóðið fleyt:
”Ólukka í hondina,
ið hundin skjeyt!”

15. Allar kurlaði hann línurnar,
tann argi fjendi:
Oman varð hann kastaður,
tað var hans endi.

Keisarakvæði – ella Hundatátturin, er her avskrivaður eftir Táttabók I, sum Jóannes Patursson gav út í 1934. Tátturin er úr savninum hjá Hammershaimb, tað lesist í Føroya kvæði 36. bindi, har uppskrift A er næstan sum henda (6. ørindi justerað). Í Tættir III hjá M. Johannesen verður sagt, at Jens Hendrik Djurhuus (1799-1892) úr Kollafirði hevur yrkt. Tátturin er um, tá ið ein hundur, sum æt Pann, skuldi skjótast. Hetta gekk somikið illa, at menn fingu tátt. jd.